

## Norðoyastevnan í luftini

Hóast Norðoyastevnan bert verður hildin í Norðoyggjum, so hava føroyingar aðrastaðnis eisini møguleika at fylgja við, hvat hendir í Klaksvík.

Norðoyastevnuaftan sendir Útvarp Føroya nevniliga beinleiðis frá Norðoyastevnuni.

Tað er Studio Pegasus, sum skipar fyri hesum, og á skránni verður mangt og hvat.

Millum annað verður ein musik-café løgd til rættis í útvarpsstovuni, samstundis sum norðoyastevnu-gestir eisini støkka inn á gólvið.

Umframt hetta verður eisini beinleiðis prát úr býnum.

Norðoyastevnusendingin hjá Studio Pegasus byrjar Norðoyastevnuaftan klokkan 19.00, og verður, við stuttum millumbilum, at hoyra heilt til klokkan 01.00

# mmmm...himmalskt

**Herfyri lat ein nýggj vakurleikaklinikk upp í Klaksvík. Hon fekk navnið Rósan, og bjóðar fram viðgerðir av ymsum slag.**

**Vit hava verið á eini vitjan...**

VAKURLEIKI
*Ragnhild Ellingsgaard*

– Lat teg bara úr, og legg teg á beinkin, sigur hon í hvíta kittlinum.

Eg stúrsi við. Hóast eg hevði væntað, at klæðini skuldu av, so kennist hetta undarligt.

Men eg geri, sum hon biður meg. Taki klæðini av, og leggi meg á plastikkið á beinkinum.

Hon tekur plastikkið og leggur tað útyvir kroppin, og beinanvegin kenni eg meg betur.

Undir plastikkinum liggur okkurt heitt, og skjótt merki eg ein dámligan hita breiða seg um allan ryggin.

Veggirnir rundan um meg eru bláir, og onkustaðni inni í rúminum stendur ein fløguspælari, sum sendir sissandi tónar í oyru míni.

Millum tónarnar hoyri eg eisini ljóðið frá aldum, sum bróta seg inn yvir onkra strond, og eg lati tónarnar føra meg burtur.

Burtur frá stressandi dagligdegnum við dead-lines, sum altíð skuldu haldast. Burtur frá regninum, sum í dagavís hevur skolað oman yvir býin.

Eg eri nú stødd onkra aðrastaðni. Onkrastaðni, har orðið deadline er eitt ókent orð, og har regnið og kuldin ikki finna veg.

Eg eri ikki heilt greið yvir, hvar eg eri stødd. Eg ørminnist, at eg fyri løtu síðani fór inn í eina vakurleikaklinikk, men eg eri ikki longur í Klaksvík.

Plastikkið kennist sum heitt silki, og eg njóti løtuna.

Rúmið fyllist við einum anga av appilsinum, og tankarnir leita mót ferðini, sum stendur fyri framman. Ferðini til eitt heitari land enn Føroyar. Hugsi, um appilsinir munnu vaksa í tí landinum, men sleppi tankanum aftur.

Merki eina heita hond taka fast í herðarnar, og varisliga mýkir hon øllum knútunum, ið eru komnir av ov nógvum tímum framman telduni.

Hondin flytir seg oman mót armunum, og úr hondini spreikja smáar hitakeldur. Hitin otar sær veg inn í allan kroppin, og eg andi appilsinangan djúpt inn.

Brádliga sleppur hondin takinum, og eg hoyri okkurt skrambul aftan fyri meg. Lati eyguni upp, vendi mær við og síggi hvítklæddu kvinnuna standa og blanda eina grønbrúna evju saman.

Spyrji, hvat hatta er fyri nakað. Men hon smílist bara, og biður meg leggja meg aftur.

Og enn einaferð geri eg, sum hon biður.

Merki, at okkurt mjúkt og heitt verður smurt fyrst á føturnar, síðan upp eftir beinunum, á búkin og til síðst eisini á armarnar.

Síðan ballar hon enn einaferð plastikkið rundan um kroppin, og leggur eitt tungt teppi oman á meg.

– Nú skalt tú bara liggja her og slappa av í 20 minuttir, sigur hvítklædda kvinnan blídliga, og fer síðan út úr rúminum.

Eg lati aftur tankarnar leita mót fremmanda landinum, ið eg skjótt skal vitja, og merki aftur ein hita leggja seg út yvir kroppin.

Hitin kemur ikki frá tonkunum um forkunnuga landið, men heldur frá teppinum, ið liggur á mær.

Kroppurin gerst tungur, og eg detti spakuliga inn í eina dreymaverð.

Eg droymi um appilsinir og strendur, um hita og kláran sjógv.

Eg hoyri vatn renna, og síggi ein foss framman fyri mær. Framvið fossinum vaksa pálmar av alskins slag, og eg seti meg niður.



*Eg eri ikki longur stødd í Klaksvík, men onkra aðra staðni. Onkrastaðni, har orðið dead-line er eitt ókent orð, og har regnið og kuldin ikki finna veg*

Men bradliga vakni eg, og kvinnan stendur undir liðini á mær.

Rennandi vatnið var ikki ein fossur, men eitt baðikar, sum varð fylt.

Hon tekur varisliga teppið og plastikkið av, og biður meg seta meg í baðikarið.

Síðan fer hon út aftur úr rúminum, og eg eri enn einaferð einsamøll.

Vatnið er grønt og angar av reinum sjógvi, og eg leggi meg spakuliga niður.

Síggi, hvussu grønbrúna evjan fer av kroppinum, og blandar seg við vatninum. Taki hondina eftir beininum og merki, hvussu mjúkt tað er vorðið.

Á vegginum hongur ein baðikápa. Eg lati meg í hana, og gangi mót klæðum mínum.

Lati meg í, og sigi farvæl við bláu veggirnar og sissandi tónarnar. Eg havi fingið nýggja orku til fleiri dead-lines, og fari aftur til arbeiðis.

# Kalt borð á Hotel Norð

**Fríggjakvøldið á Norðoyastevnu skipar Hotel Norð á Viðareiði fyri hugnakvøldi. Borðreitt verður við køldum borði og eisini verður undirhald á skránni. Annars letur hotellið dyrnar upp til summarið Norðoyastevnuaftan, og verður opið alment alt summarið**

HUGNAKVØLD
*Solby A. Eliasen*

Í fjør skipaði hotellið fyri gallakvøldi, har heitur matur var á skránni. Og var undirtøkan sera góð tá. Í ár hava tey so valt at royna seg við køldum borði. Undirhald verður eisini undir borðhaldinum, og verður tað Hans Hjalti Skaale, sum kemur at standa fyri tí. Bussamband verður bæði norður og inn aftur til Klaksvíkar aftaná.

Kokkur á hotellinum er Jógvan Heinesen, sum varð útlærdur í fjør. Hann er samstundis eigari av hotellinum og rekur tað saman við Mirjam. Jógvan er 27 ára gamal, og sigast má, at hann helst er ein av teimum yngstu hoteleigarunum í landinum.

Mirjam M. Heinesen, sum starvast á hotellinum, sigur annars, at hotellið letur upp fyri almenninginum tann 01. juni og verður opið alt summarið til okkurt um 01. septembur. Hon greiðir frá, at ferðafólk byrja at bíleggja sær pláss longu árið fyri tey koma.

Hotellið fer í summar at skipa fyri útferðum eina ferð um vikuna fyri gestum og øðrum, sum eru áhugaði í at síggja nærumhvørvið rundan um Viðareiði. Mirjam sigur, at útferðarleiðari verður altíð onkur, sum er barnvaksin á Viðareiði. Á henda hátt, meta tey, at møguleikin fyri eini avbera góðari útferð so avgjørt skuldi verið til staðar.



*Hotel Norð borðreiður við køldum borði á Norðoyastevnu*

Mirjam sigur, at tey á hotellinum hava góðar vónir til summarið.

Hon heldur, at Norðoyggjar eru nakað serligt. Her sipar hon til, at náttúran er so stórsligin har norðuri.

– Alt er eisini so óspilt, heldur hon. Hon sigur eisini, at um talan er um, ferðafólk ið ynskja at koma til eitt friðarligt stað, so er tað avgjørt ein fyrimunur, at hotellið liggur á Viðareiði.

– Tað er eisini nemt at sleppa til Klaksvíkar, um ein ynskir tað. Har hendir meira enn her, men so hava tey altíð eitt friðarligt stað at koma aftur til, har tey bara kunnu slappa av og njóta ta óspiltu náttúruna, sum er her, sigur Mirjam, sum heldur, at um ein eitt nú skal ein túr suðueftir, so verður ein leiddur mest sum allan vegin, meðan ein sum kemur henda vegin, má vera meiri sjálvstøðugur.

– Um tú ert ein av teimum, sum ynskir eina charter-ferð, so haldi eg ikki, at ein átti at komið her, sigur Mirjam og flennir.

Hotel Norð hevur fimtan dupultkømur, so tey kunnu hýsa upp til tríati vitjandi í senn. Mirjam sigur, at tað eru mest einstaklingar, sum gista hjá teimum, men tað kemur eisini fyri av og á, at bólkabíleggingar eru.

– Hotellið verður ofta nýtt til ymiskt skeiðvirksemi og onnur tiltøk, og tá fáa vit sjálvandi bólkabíleggingar. Eisini eru aðrar bólkabíleggingar, men sum sagt er tað ikki so ofta, sum einstaklingar, sigur Mirjam, sum at enda leggur afturat, at hóast hotellið er stongt um veturin, so taka tey í móti bólkabíleggingum til eitt nú skeið ella okkurt líknandi alt árið runt.




KLAKSVÍK vár SALTANGARÁ

# KIOSK VÁR

Klaksvíksvegur 56 · Klaksvík

EL VITAL, Shampoo
Frítt val, 1 dk.
19,95,-

GROV FLUTE
1 pk.
16,95,-

SUKUR
2 kg.
8,95,-

SÚREPLAJUICE
1 ltr.
5,95,-

FØROYA BJÓR SODAVATN
2 x 1,5 ltr.
19,95,- + pant

MINI FLUTE
1 pk.
16,95,-

CHIPS
250 gr.
7,95,-

MILK SHAKE
1 dk. bert
4,95,-
Vel ímillum jarber, vanilju, kakao ella sitrón

FRANSKUR HOTDOG
Og 1 Jolly 0,5 ltr.
19,95,-

MERRILD KAFFI
500 gr.
16,95,-

PINGVIN LAKRES
Frítt val 1 pk.
7,95,-

HEITT CACAO
12,00,-

PIZZA SLICE
Og 1 FAXE KONDI 0,5 ltr.
19,95,-

DRIFTER, LION BAR, KIT KAT
Frítt val 3 stk.
11,95,-

APPELSINJUICE
1 ltr.
6,95,-

PH. BÚFFAR
24,95,-

Hvønn morgun nýbakað morgunbreyð og nýbakað breyð allan dagin



Vit øll í Kiosk Vár eru komin í Norðoyastevnuhýri, og bjóða øllum inn á gólvið, her eru altíð nógv góð tilboð at fáa

GÓÐA NORÐOYASTEVNU

Opið er hvønn dag frá kl. 07.00 - 23.00
Leygardag og sunnudag frá kl. 08.00 - 23.00